## Frem tapti eftir málríkan dyst

Atli Danielsen og liðfelagararnir í Frem taptu 3-4 ímóti HIK í donsku 1. deild í gjár. Longu í 9. minutti kom Frem aftur um 0-1, men innan teir næstu 8 minuttirnar syrgdu Fosu Boateng og Wassim el Banna fyri, at Frem fekk eina 2-1 leiðslu, sum eisini gjørdist hálvleiksstøðan. Henda støðan helt sær til 20 minuttir vóru eftir, men tá raplaði alt hjá Frem. Uppá eitt korter var støðan vend til 2-4 til HIK. Tim Ilsø minkaði um munin í yvirtíðini, men tað var ikki nóg mikið fyri Frem.



## Bara tveir fótbóltsskúlar

Nógvu tey seinastu árini hevur Fótbóltssambandið skipað fyri fótbóltsskúlum kring landið. Seinastu árini er talið á støðum, har fótbóltsskúlar hava verið, lækkað, og nú boðar FSF frá, at tað í summar bara verða tveir fótbóltsskúlar. Annar fótbóltsskúlin verður á Toftum, og hin verður í Sandavági. Í báðum støðum verða skúlarnir 27. og 28. juni. Í ár fer tilmeldingin fram á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum. Latið verður upp fyri tilmelding hósdagin 15. mai.

# Fýra finalur í tríggjar dagar

**Avbjóðingin er stór, men hvør sum ein gleða føroysku flogbóltskvinnurnar seg, nú tær loksins sleppa at spæla altjá dystir á heimavølli**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru úti við tveir mánaðir síðan, at føroysku flogbóltskvinnurnar settu punktum fyri heimligu kappingini.

Komandi EM-undankappingin á heimavølli er tó nakað, sum lokkara heilt nógv, og tí hava kvinnurnar lagt nógv fyri í venjingum líka síðani.

Ein tann royndasti spælarin á føroyska liðnum er Margit G. Joensen úr Mjølnir. Men hóast hon í 15 ár hevur verið fastur partur av liðnum – burðarfarloyvi undantikið – er hetta fyrsta ferðin, at hon veruliga sleppur at royna seg á heimavølli.

- Vit hava onkra tíð spælt venjingardystir móti Íslandi, men veruliga teljandi dystir hevur talan ikki verið um. So hetta er sjálvandi nakað, sum eg gleði meg sera nógv til. Og at talan er um EM-undankapping ger sjálvandi ikki spenningin minni, sigur hon.

### Venja um morgunin

Saman við liðfeløgunum hevur Margit seinastu tveir mánaðirnar verið partur av fastari rutinu, har landsliðssamlingar hava verið í Kollafirði hvønn týsdag, meðan vikuskiftini hava verið nýtt í Havn. Vant hevur verið tvær ferðir um dagin, og hetta tænir eisin sínum endamáli.

- Sjálvandi er tað hart, tá tú venur somikið nógv, men talan er jú eisini um tekniska venjing, sum ikki er so fysiskt krevjandi.

- Fyri okkum er tó eisini týdningarmikið, at venja kroppin við at spæla ymisk tíðspunkt á degnum. Eitt nú skulu vit spæla leygarmorgunin klokkan 10, so tað skulu vit eisini venja okkum við.

### Fýra finalur

Á Oyggjaleikum hevur Margit verið partur av fleiri serstakliga spennandi finalum móti Saaremaa. Dystir, ið nærum pr. siðvenju fara út í fimm sett.

Men hóast sjálvar finalurnar hava verið spennandi, hevur avbjóðingin á Oyggjaleikum til tíðir verið nakað avmarkað. Nakað, sum Margit tó ikki roknar við, verður galdandi komandi vikuskiftið.

- Hóast Oyggjaleikirnir eru ein stór uppliving, so eru fleiri rímiliga lættir dystir á skránni har. Og tí kann ein EM-undankapping als ikki sammetast við leikirnar. Vit kenna ikki tað heilt stóra til mótstøðuliðini hesaferð, men eg eri púrasta vís í, at talan verður um nakrar knallharðar dystir. Í so máta verður tað kanska sum at spæla fýra oyggjleikafinalur upp á tríggjar dagar. So tað er heilt víst nakað, sum setir serstakliga stór krøv til okkum.



*Føroysku kvinnurnar kenna lítið til mótstøðuna. Men Margit G. Joensen ivast ikki í, at talan verður fýra knallharðar dystir hjá føroyska liðnum*



*Flogbóltskvinnurnar draga vanliga hópin av føroyskum áskoðarum, tá spælt verður á Oyggjaleikum*

## Betri á bygd

Á oyggjaleikum hava føroysku flogbóltskvinnurnar fingið dyggan stuðul frá eini áskoðarafjøld, sum aloftast hevur verið bæði harðmælt og fjølment.

Tað vónar Margit Joensen sjálvandi eisini, at fjøldin verður um vikuskiftið, men hon fær illa svarað annað enn játtandi, tá spurt verður, um tað var betri, um dystirnir vórðu spældir á bygd heldur enn í Havn.

- Ja. Eg skal absolutt ikki siga nakað negativt um tað, at vit spæla í Havn, tí bara tað at spæla á heimavølli er stórt. Men veruleikin er samstundis, at eingin á liðnum er úr Havnini. Og hartil hevur Havnin ikki ta stóru siðvenjuna viðvíkjandi flogbóltsáskoðarum. Har verður aloftast gjørt nógv burturúr á bygdunum.

- Men vit vóna kortini, at stuðulin verður góður. Nú er talan um dystir um eitt vikuskifti, so tað ber kanska betur til hjá fólki at koma til Havnar. Og hóast vit ikki kunnu rokna við, at fjøldin verður eins stór allar dystirnar – til dømis leygarmorgun – so rokni eg við, at nakað av áskoðarum verður. Undir øllum umstøðum hava vit tørv á góðum stuðli, sigur Margit Joensen.

**-mørk**

## Nógv skal rigga

Tað eru ikki smávegis fyrireikingar, sum FBF skal fáa á hondini, nú føroyskur flogbóltur skipar fyri EM-undankapping. Umframt hópin av praktiskum viðurskiftum, sum altíð skulu skipast til slík tiltøk, er talan eisini um stóra mongd av arbeiðsmegi, sum skal til, tá dystirnir skulu avgreiðast. Dómarar skulu sjálvandi setast til dystirnar, men kring hetta skulu eitt nú 40 linjuverjar, 60 bóltgentur, 30 skrivarar og 20 gólvsvabarar standa til reiðar. Sjálvandi verða nøkur nøvn at síggja meira enn tí einu ferðina, men talan er kortini um stóra uppgávu hjá fyrireikarunum.

### FAKTA um dystin

**Dystarskráin**

| | | |
|---|---|---|
| 16.05 | 12.00 | Skotland-Luksemburg |
| 16.05 | 15.30 | Írland-Liktenstein |
| 16.05 | 18.15 | Føroyar-Skotland |
| 17.05 | 10.00 | Írland-Føroyar |
| 17.05 | 13.30 | Liktenstein-Luksemburg |
| 17.05 | 16.30 | Skotland-Írland |
| 17.05 | 19.30 | Føroyar-Liktenstein |
| 18.05 | 13.30 | Luksemburg-Írland |
| 18.05 | 16.00 | Liktenstein-Skotland |
| 18.05 | 19.30 | Luksemburg-Føroyar |

Sosialurin -har tað hendir